

# útflutningsvinna

*Um tann føroyska vinan ikki kann fáa tær heimligu tilvísingarnar, tað vil siga eina almenna dygdar- og góðskubygging her heima við føroyskum ráðgevum, sum muna nakað, koma vit ongantíð út í heim, staðfestir Mayfinn Norðoy, formaður í Arkitektafelagnum*

í mun til tíð og samfelagstøðu.

Tórshavnar kommuna hevur í stóran mun, aftaná útstykkingina í Hoyvíkshaganum, latið útbyggingina innan búðstaðir upp í hendurnar á arbeiðstakarum og sokallaðum "developarum", ella íleggjarum.

Hetta skapar eitt spekulatiónsumhvørvi innan íbúðarbygging. Úrslitið er, at íbúðareindin er so mikið kostnaðarmikil, at frívirðið við at fara úr sethúsum í íbúð fánar burtur. Tey eldru velja tískil í stóran mun at vera verandi í sínum sethúsum. Avleiðingin av bústaðarpolitikkinum hjá t.d. Tórshavnar kommunu er, at privat grundstykki kosta 1.8 mio. at ogna sær. Gomul niðurslitin sethús kosta 2.2 mio – Byggiharrar ríka seg upp við at selja íbúðir fyri Kr. 25.000,- pr. fermetur og upp í 3.0 mio. fyri raðhús. Havnar kommuna skuldi heldur roynt seg við sosialari bygging.

### Almenna byggivirksemið

Spurdur, hvat hann heldur um almenna bygging í dag og í hvønn mun almenn bygging er myndað av føroyskum arkitekturi, sigur Mayfinn:

Eg haldi tað vera syndarligt at síggja, hvussu tað almenna - bæði stjórnarráð og stovnar, húsast. Mín meting er, at tað almenna eigur at ganga undan og vísa, hvussu nógv tað hevur at týða fyri innihaldið og virksemið í einum bygningi, at tað byggilistarliga er í hásæti.

### Almenn bygging - tilvitað útihýsing av føroyskum fyritøkum

Vit spyrja Mayfinn um almenna byggipolitikkin og hvussu almenn bygging hóskar til føroysk viðurskifti og hvussu hann sum heild metir nýggjar almennar bygningar? Hvussu eru teir sum byggilistaverk? Vit spyrja eisini, hvussu almennar arkitektauppgávur verða latnar og nevna, at tað tykist sum ávísar stórar arkitektafyritøkur hava allar stórar almennar uppgávur - hvat merkir hetta fyri føroyskar arkitektur og hvussu ávirkar hetta føroyska byggilist sum heild? Ella við øðrum orðum: Eigur tað almenna, land og kommunur, í øllum førum at skriva út arkitektakappingar, tá talan er um almenna bygging?

Tórshavnar kommmuna og Landsverk hava í seinastuni havt lýsingar í útlendskum og føroyskum bløðum um prekvalifikatión til ráðgeving til ávíkavist Ellisdepil úti við Strond og Skúladepil við Marknagil.

Orðingin í lýsingunum er soleiðis háttað, at tað kann ikki kallast annað enn tilvitað útihýsing av føroyskum fyritøkum. Lýsingin hjá Tórshavnar kommunu var enntá 2-3 vikur fyrr í teimum útlendsku fjølmiðlinum.

Ikki fyrr enn Arkitektafelagið spyr kommununa um málið, kemur lýsingin í føroysku fjølmiðlarnar. Tórshavnar kommuna hevur eisini koyrt onnur ráðgevaraarbeiði, so sum heildarætlan fyri kommununa og Ítróttarhøll á Nabb, beinleiðis av landinum uttan kapping. Fyrst og fremst metir arktektavinnan, at tað er sera óheppið og ikki vinnuni til frama, at eingin føroysk fyritøka kann prekvalifiserast til uppgávuni. Krøvini til prekvalifikatiónina eru snøgt sagt sett alt ov høgt. Krøvini til fíggjarliga orku, royndir og arbeiðsorku hjá ráðgeva fylla ov nógv og botna bert í tíðarkarmi til avgreiðslu av projektering. Tíðarkarmin kann byggiharrin planleggja betur og hann skal haldast upp ímóti øðrum faktorum.

### Totaløkonomisk atlit

Í hesum tíðum, har tosað verður um undirskot á handilsjavnanum, er tað undrunarvert, at tað almenna gongur á odda við at innflyta ráðgeving, sum kundi verði framd í Føroyum. Hetta er eisini beinleiðis móti kjakinum og rákinum um vitanarsamfelagið og vantandi heimafturflyting av útbúgvnum fólki. Fyri hesar báðar nevndu verkætlanir er talan um 20-25 ársverk í arkitektavinnuni tey næstu 4 árini. Talan er eisini um, at arkitektavinnan er grundarlagið fyri so nógv annað virksemi t.d. verkfrøðinga- og byggifrøðingaarbeiði, umframt handverkaravinnuna og smásølu. Hetta merkir, at allir ringvirkningar av vitanararbeiðinum eisini verður flutt av landinum.

Ráðgevaraparturin fyri Ellis- og Skúladepil er tilsamans uml 50-70 mio kr., sum fara beinleiðis av landinum, umframt mistar skattainntøkur, mist arbeiðspláss og mist tilflyting.

Var uppgávan avrikað her heima, hevði hon eisini verið við til at skapa kontinuitet og ment ta føroysku arkitektavinnuna, so hon í framtíðini kann fara út í heim og skapa enn meira arbeiði í Føroyum.

Ein fráskrivar sær soleiðis so at siga førleikamenning, vitanarsavning og vanliga menning av arkitektavinnuni. Tískil gagnar hetta bert stórum útlendskum fyritøkum. Hinvegin meta tey føroysku virkini uppgávuna hvørki at verða óvanliga stóra ella at krevja serkunnleika. At byggja ein nýggjan Hoyvíkar skúla, ella Argja skúla megna vit, tí standa vit spyrjandi, hvat hetta við Ellisdepli og Skúladepli skal verða gott fyri, annað enn at leypa uppum har garðurin er lægstur uttan fyrilit fyri tí, sum henda gongd og hesin framferðarháttur hava við sær av óhepnum fylgjum fyri partar av føroyskari byggivinnu.

### Strámannavirksemi

Føroysku virkini hava merkt áhuga frá útlendskum fyritøkum um samstarv um uppgávuna. Tá talan ítøkiligt er um, á hvønn hátt samstarvið skal skipast, kundi hugburðurin um samstarv mint um strámannavirksemi. Tað sær gott út á pappírinum at hava ein føroyskan samstarvsfelaga, men tað mennandi arbeiðið skal gerast